Sosialurin



## Sangarar úr Marsdal vitja

Í einum gomlum dekshúsi av fregattini Ingolf hittast limirnir í „Marstal Småborgerlige sangforening“ hvønn týsdag til venjingar. Kravið, at gerast limir, er at tú hevur sjófartsbók. Sjógvurin er bindiliðið og tað hoyrist eisini á sangunum, nógvir góðir gamlir sjómanssangir, bæði danskir og enskir og nógv onnur góð løg. Kórið hevur ikki kórleiðara og syngur ikki fleirraddað, skuldi tað komið fyri, so er tað av tilvild. Sangfelagið hevur givið út tríggjar fløgur, ið tilsamans hava selt útvið 20.000 eintøk. Umframt fløguútgávur hevur felagið luttikið á shantyfestivalum og stevnum og hevur ferðast víða, bæði í Danmark, Týsklandi, Írlandi, Skotlandi og Isle of man. Føroyaferðin er fyriskipað av Heina Hestoy, ið er forsangari og ein av stovnarunum av teimum "småborgarligu". Á Føroyaferðini eru 25 sangarar. Vitjað verður í Leynum, í Havn og á Tvøroyri. Útferðir verða við Norðlýsinum. Haraftrat verður nógvur sangur og fleiri framførslur, millum annað verður sungið í SMS leygardagin 4. oktober klokkan 13.



# Ikki tað rætta fyri Sørvágs Kommunu

**Nú endaliga er samtykt at Mið- og Sandavágs kommunurnar leggja saman til Vága Kommunu eru tilsamans tvær kommunur á oynni. Men ikki er líkt til at Sørvágs kommuna fer uppí samstarvið, uttan so at broytingar koma frá Landsstýrinum**

KOMMUNALPOLITIKKUR
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin í Sørvágs Kommunu metir hvørki tað vera fyrimunir ella vansar hjá teimum at koma uppí nýggju stóru kommuna*

Borgarstjórin í Sørvágs Kommunu, Jákup Suni Lauritsen sær jaligt uppá samstarvið millum hinar báðar kommunurnar, men metir ikki hesa tilgongdina vera tí røttu fyri Sørvágs Kommunu í verandi løtu. Tað er umráðandi at ikki bara hyggja eftir vansum, við at vera fyri seg sjálvan, men eins týdningarmikið er at vita hvørjir fyrimunirnir veruliga eru, greiddi hann frá. – Hinar báðar kommunurnar hava longu nógv samstarv og nóg, ið tær eru saman um, so sum skúli og sløkkilið, hetta er ikki støðan hjá Sørvágs Kommunu, greiddi hann frá. Hann helt at samanleggingin var ein heilt náttúrlig tilgongd.

### Møguliga einaferð

Í verandi líki er ikki nógv hjá Sørvágs Kommunu at fara eftir í eini samanlegging. Nógv samstarv er longu til hinar kommunurnar, og hann metir tað ikki vera nøkur orsøk til at hetta ikki skuldi hildið fram. Lítlu bygdirnar, Bøur, Gásadalur og Mykines eru komnar uppí og nú telur kommunan tilsamans 1.200 fólk, og tørvur er ikki á fleiri samanleggingum í løtuni.

Men ein samanlegging er í eygsjón. Jákup Suni Lauritsen legði stóran dent á, at, um ein verulig orsøk kemur til sjóndar, kemur málið av álvara aftur upp at venda. – Eg vænti ikki at Landsstýrið leggur stóru funktiónirnar út til kommunurmar um tvey ár, segði hann svartskygdur. Men um hetta skuldi hent, hevði ein verulig orsøk verið hjá Sørvágs Kommunu at farið uppí.

Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum hevur boða frá, at virkandi frá 1. januar 2011 verða bygnaðarbroytingar í kommununum. Hetta merkir at kommunurnar fáa blokkstuðul og somuleiðis fleiri málsøki at umsita. Umframt hetta er ætlanin at einans sjey kommunur skulu vera í Føroyum um góð tvey ár.

### Eingin fólkaatkvøða

Sørvágs Kommuna hevur ikki valt at ikki fara uppí, teir hava líka so lítið valt at fara uppí. Um kommunan skuldi halda eina gongd fram móti samanlegging, var uppi og vendi á fundi, men uppskotið kom ikki ígjøgnum. Eingin fólkaatvøða hevur verið í Sørvágs kommunu, so sigast kann ikki at fólkið hevur tikið avgerðina.

# Fólkatingið fær Høgna

**Nýggja samgongan fevnir ikki um Tjóðveldisflokkin, og hetta merkir at Høgni Hoydal kann seta seg á sítt pláss á Fólkatingi, sum hann fekk í 2007. Sjúrður Skaale hevur sitið har síðan CHE-samgongan varð skipað í februar í ár**

POLITIKKUR
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Eftir samgongan, har Høgni Hoydal slapp at vera við, slitnaði hevur tað staðið honum í boði at sessast á Fólkatingi. Hann var innvaldur á valinum í 2007, men hevur rikið politiska arbeiðið í Føroyum.

Nú nýggj samgonga endaligt er skipað fer hann til Danmarkar at røkja plássið har. Men hevur enn ikki avgjørt nær hann fer til arbeiðis har. – Eg fari um eina tíð, havi fyrst nøkur viðurskifti, ið eg má hava avgreidd her heima, segði hann.

### Farloyvi uttan løn

Tað stendur føroyskum politikkarum, ið mugu fara í farloyvi vegna politiskt virksemi at fara við løn. Ávísir politikarar hava gagnnýtt hetta, tá orsøkinum hevur verið at eittnú røkja fólkatingssessir. Spurdur um hann fór at gera so við, svaraði hann, sum hann áður hevur gjørt greitt, at hann ynskir ikki at gera tað. Hann velur sostætt at fara uttan at fáa tvífaldaða løn. Hetta er ein avtala í øllum flokkinum, at tey ikki taka ímóti báðum lønunum samstundis.

### Fólkatingsgrunnurin

Umframt at ikki fáa tvífalda løn er ein avtala gjørd í Tjóðveldi um at lata 20% av Fólkatingslønini, um ein røkir tvey størv, í ein grunn. Fólkatingsgrunnurin, sum hann eitur, verður nýttur til kunning og fremjandi átøk fram móti sjálvstýri. Limir Tjóðveldisins, ið hava verið í hesi støðu, og hava latið í grunnin, eru Høgni Hoydal, ið hevur váttað, at hann eisini hesu ferð fer at lata peng, og Torbjørn Jacobsen. Peningurin, ið nú er í grunninum, verður í fyrstu atløgu nýttur, til at skriva søgu flokksins.

*Høgni Hoydal fer á Fólkating eftir at hava avgreitt nøkur viðurskiftir*

